## HJÁ GUNLEIVI

# Bakaralærlingur

Søkt verður eftir bakaralærlingi.

Lærutíðin er 4 ár, harav 35 vikur á tekniskum skúla í Danmark.

Arbeiðstíðin er mest um dagin, hóast nakrar náttarvaktir eru.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at ringja til okkara og spyrja eftir Eli Andreasen.

**Bakaríið hjá Gunleivi**
c/o Vørður
Hoyvíksvegur 65
Tlf. 236211 ella 312161

## Tvingsilssøla

**21. apríl 2006, kl. 13.00,** verður á Dómaraskrivstovuni, C. Pløyensgøta 1,100 Tórshavn, hildin **tvingsilssøla** yvir ognina matr. nr. 130b, Sumba (AS nr. 2-1/2006).

Sambært skráseting av ogn er talan um eini sethús í Sumba í tveimum hæddum á 109 fermetrar. Húsini standa á stoyptari grund, og eru klødd við timbri. Tekjan er av tjørupappi, og vindeyguni eru plastvindeygu.
Húsini eru nærri innrættað soleiðis:
**Miðhæddin:** Køkur, stova, baðirúm, hjúnarrúm, kamar, gangur, durur og niðurgongd til kjallaran.
**Kjallarin:** Eitt innrættað kamar og rest er kjallari/vaskirúm.
Grundøkið er 745 fermetrar til víddar.
Ongin býr í ognini.

Tvingsilssølan er umbiðin av **Inga Højgaard, adv., Yviri við Strond 4, 100 Tórshavn, tlf. 311260 (sak nr.4733701),** sum kann geva nærri upplýsingar um ognina.

Tvingsilssøluuppgerð kann umbiðjast hjá nevnda advokati ella hyggjast ígjøgnum á Dómaraskrivstovuni.

**Føroya Fútarættur**
**27. mars 2006**

## Tvingsilssøla av skipi

**Fríggjadagin 26. mai 2006, kl. 13.00,** verður á Dómaraskrivstovuni, C. Pløyensgøta 1, 100 Tórshavn, hildin **tvingsilssøla** yvir línuskipið **m/s »Ekliptika« XPZE, BRT 391, NRT 145.**

Skipið er bygt í 1977 á Kystvaagen Slip & Båtbyggeri, Noregi. Skipið er skrásett í Klaksvík í 2005.

Sambært skipaskrásetingini eigur P/f Ekliptika, undir Klakki 39, 700 Klaksvík, skipið.

Fyrireikandi tvingsilssølufundur er ásettur at fara fram á Dómaraskrivstovuni **fríggjadagin tann 5. mai 2006, kl. 13.30** og verður tann, ið metir seg at hava veð í skipinum, innkallaður til fyrireikandi tvingsilssølufundin.

Sølan er umbiðin av **Óla Jákup Kristoffersen, advokati. Fr. Petersensgøtu 9, Tórshavn, tlf. 311145, (j. nr. 20060216), AS 11/2006,** sum kann geva nærri upplýsingar og sum nærri avtala kann gerast við, um ynskt verður at síggja skipið.

Áhugað kunnu eisini síggja søluuppstilling og onnur skjøl í sambandi við tvingsilssøluna við at venda sær til Føroya Fútarætt.

**Føroya Fútarættur**
**27. mars 2006**

# Dagrøktarar til Leirvíkar kommunu

Dagrøktarskipanin í Leirvíkar kommunu søkir eftir dagrøktarum og møguligari hjálp, at byrja tann 1. mai 2006.

**Vit ynskja at tú**
- Hevur góðar umstøður at hava børn bæði inni og uttanfyri.
- Tekur ábyrgd og kanst arbeiða sjálvstøðugt.
- Vísir virðing fyri børnum, foreldrum og starvsfeløgum.
- Ert álítandi og hevur góð samstarvsevni.
- Ert tolin og vísir umsorgan.
- Hevur hegni og áhuga í at menna børnini.
- Dugir at síggja møguleikar í staðin fyri forðingar.

Í dagrøktarskipanini starvast 8 dagrøktarar og ein leiðari. Talið av børnum í dagrøktini er 40.

Ein fastan dag um vikuna eru 3 dagrøktarar saman við børnum í spælistovuni og 1,5 tíma um vikuna eru allir dagrøktarnir ísenn við børnunum í fimleikarhøllini.
Arbeiðstíðin er ímillum 7.30-17.15. Lønin er sambært sáttmála við FA.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til tlf. 443251 og tosa við Marion Leifsdóttir, dagrøktarleiðara.

Skrivlig umsókn skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 11. apríl 2006.

Vinarliga send umsókn tygara til

**Leirvíkar Kommunu**
**Dagrøktarskipanin**
**Postboks 42**
**520 Leirvík**

# Fólk til rottangatænastuna hjá IRF

Søkt verður eftir fólki til rottangatænastuna hjá IRF, at byrja skjótast gjørligt.

**Arbeiðið umfatar:**
I. Tøming av rottangum í IRF-økinum og í Tórshavnar Kommunu.
II. Umframt annað fyrifallandi arbeiði hjá IRF.

**Krøv til umsøkjaran:**
I. Stóra koyrikortið og vanur at koyra lastbil.
II. Skal kunna arbeiða sjálvstøðugt.

**Galdandi sáttmáli:** Lønarsáttmáli fyri fastløntar millum Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag. Skrivlig umsókn skal vera okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin 3. apríl 2006.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til IRF, tlf. 473300, Adelbert Ellingsgaard.

IRF
Postboks 39
Leirvík

**Landssjúkrahúsið**
Fo 100 Tórshavn

# Avloysari fyri ergoterapeut

Ergoterapiin á Landssjúkrahúsinum søkir eftir avloysara fyri ergoterapeut, 35 tímar um vikuna á somatisku deild. Starvið er leyst at søkja til setan 1.mai ella skjótast til ber til og við 30. september 2006.

**Vit kunnu bjóða tær** eitt arbeiðspláss í menning við fakligum og persónligum avbjóðingum, har tú fær møguleika fyri at luttaka í okkara ergoterapeutiska toymi og í einum tvørfakligum toymi.

**Ergoterapiin fevnir um** tvær deildir ávikavist psykiatrisku og somatisku deild og hava vit ein felags leiðara, sum í løtuni hevur sína dagligu gongd á psykiatrisku deild. Á psykiatrisku deild eru 4 ergoterapeutar og á somatisku deild eru 3 ergoterapeutar.

Á Landssjúkrahúsinum verður í løtuni arbeitt við at broyta leiðslubygnaðin. Hetta inniber, at ergoterapiin og fysioterapiin eru løgd um til eina rehabiliteringseind undir leiðslu av medisinksu depilsleiðsluni.

**Arbeiðsuppgávur:**
Í ergoterapiini brúka vit eina Canadiska fyrimynd sum fatanargrundarlag.

**Ergoterapeuturin kemur at luttaka í viðgerðini av:**
- Innløgdum sjúklingum, (hemiplegi, RA og aðrar medisinskar sjúkur)
- Ambulantum brúkarum (hondkirurgiskir)
- Ráðgeva og vegleiða sjúklingum og avvarandi um broytingar í heiminum.

**Vit leggja dent á** persónligar eginleikar, so sum greiða talu og gott arbeiðslag.

**Nærri fæst at vita** um arbeiðsuppgávur við at venda sær til Súsannu Winther Poulsen, leiðandi ergoterapeut, tlf: 304500, lok. 5785 og 5786.

**Løn- og setanartreytir** sambært sáttmála millum Ergoterapeutfelagið og Fíggjarmálaráðið.

**Skrivlig umsókn** við avriti av prógvi og øðrum upplýsingum skulu sendast til:

**Landssjúkrahúsið**
Lønar- og starvsfólkadeildin
FO-100 Tórshavn

**Umsóknarfreistin** er 18. apríl 2006 kl.12.00

Hava tit minst til at goldið haldaragjaldið av Føroya besta blaði...!!!

Tórsgøta 1 · tel 34 18 00 · fax 34 18 01
post@sosialurin.fo · www.sosialurin.fo
Sosialurin